ST-Dagur — hvat er tað?

Javier Pérez de Cuéllar, aðalskrivari Sameindu Tjóða, hevur skrivað:

Stovnsetingin av Sameindu Tjóðum í 1945 setti merki við eina nýggja byrjan í viðurskiftunum hjá tí globala samfelagnum. Við at semjast um ST Sáttmálan og reisa eina virkandi skipan av altjóðaligum samstarvi, avgjørdu stjórnir at seta viðurskifti millum tjóðir á eitt felags grundarlag, øðrvísi enn tað, ið hevði verið orsøk til afturvendandi ósemjur og ófrásigiligar liðingar ígjøgnum øldir. Tær tóku felags avgerð um at útrudda krígs pláguna, styrkja frið í samsvari við rættvísi og altjóðaliga lóg, hava virðing fyri tjóðum, stórum og smáum, virka fyri sosialari framgongd, verja mannarættindi og nýta Sameindar Tjóðir sum miðstøð fyri samskipanini av stigum sínum til uppnáing av hesum felags miðum.

Árini síðani tá hava verið ár við støðugari og grundleggjandi broyting. Tey hava sæð víðfevnandi øking í bæði limatalinum og málunum hjá Sameindu Tjóðum. Í øllum hesum hevur heims felagsskapurin verið vitni til ein hildligan lista yvir uppnáingar. Friðarvarðveitandi styrkir, sendar út á markina, hava hildið hjálandaveldi, hava hildið figgindaskapum í teymunum. Fólk, ið fyrr vóru undir hjálandaveldi, hava fingið sjálvstýri og fult sjálvræði. Skjól og hjálp er veitt flóttafólki. Meira enn 60 lóglig tól eru tikin í nýtslu til tess at skapa virðing fyri mannarættindum. Altjóðalig lóg hevur verið víðkað og skipað. Sjúkur hava verið beindar burtur av jørðini.

Men Sameindu Tjóðir eru ikki til í einum vakuumi. Skal Felagsskapurin náa síni mál, so tørvar honum stuðul frá fólki heimsins. Hinvegin má tann stuðvlin vera grundaður á skilning av úrslitum hansara og av orsøkunum til, at førleiki hansara enn ikki er fullvegis gjørdur veruligur. Sameindu Tjóða Sáttmáli byrjar við orðunum »Vit fólk heimsins«; fyrst og fremst, tað er fólk heimsins, ið Felagsskapurin má hava í huga.

Endurgivið úr ST útgávuni »Basic Facts About the U.N.« Í somu útgávu stendur:

Sameindu Tjóða Sáttmáli varð settur saman av umboðum fyri 50 lond á Sameindu Tjóða Ráðstevnu um Altjóðaligan Felagsskap, ið komu saman í San Francisco frá 25. apríl til 26. juni 1945. Hesi umboð viðgjørdu uppskot, ið vóru smíðað av umboðunum hjá Kina, Sovjettsamveldinum, Bretlandi og USA, í Dumbarton Oaks, august-oktober 1944. Sáttmálin varð undirskrivaður tann 26. juni 1945 av umboðunum fyri tey 50 londini; Poland, ikki umboðað á Ráðstevnuni, skrivaði seinni undir og gjørdist eitt av teimum upprunaligu 51 limalondunum.

Sameindu Tjóðir gjørdust almert til tann 24. oktober 1945, tá Sáttmálin varð staðfestur av Kina, Fraklandi, Sovjettsamveldinum, Bretlandi og USA og av einum meiriluta av øðrum londum, sum høvdu skrivað undir; 24. oktober verður hvørt ár hátíðarhildið sum **Dagur Sameindu Tjóða**.

Bahá'íar trúgva, at jarðarknøtturin nærkast næsta stigi í menning sínari — heimsfriði og byrjanini av heims siðmenning. Teir trúgva, at hendan broyting krevur, at allar tjóðir koma saman, og tí er tað, at teir hava stuðlað ST, síðani tað sá dagsins ljós í 1945 — teir stuðla strembanum tess fram ímóti búskaparligari framgongd fyri menningarlond og tess arbeiði fyri alheims mannarættindum, alheims skúling og heims lóg. Bahá'íar um allan heim geva ST »grasrótar« stuðul, og tað er sum partur av hesum stuðli, at Bahá'í samfelagið í Føroyum leggur hetta omanfyri standandi fram.

Meira upplýsingar um ST kunnu fáast á Bahá'í Miðstøðini í Havn.

Bahá'í samfelagið í Føroyum